

*Havstovan ætlar sær nú í samstarv við útróðrarmenn fyri at vita, um størri húkar og ymiskt agn kann minka um nøgdina av smátoski upp í línuveiðini*

Mynd: Vilmund Jacobsen

# Havstovan ætlar at gera royndir við størri húki

**VERND** Nú so nógvur smáur toskur er á landgrunninum og trupult er at fiska uttan, at smáfiskur kemur á línuna, arbeiðir Havstovan við eini ætlan saman við útróðrarmonnum. Ætlanin byggir á at gera royndir við størri og ymiskum húkum og ymiskum agni



*– Vit vita slett ikki, hvørja ávirkan hetta kundi fingið á støddarbýtið av veiðini, men vit halda, at hetta hevði verið eina roynd vert, sigur Eilif Gaard, stjóri á Havstovuni*

Mynd: Vilmund Jacobsen

Vilmund Jacobsen

Í heyst hevur Fiskiveiðieftirlitið tikið fiskiloyvi frá skipum og bátum, tí hesir hava havt ov nógvan smáfisk uppi í veiðini. Hetta er ein heldur óvanlig støða, tá ræður um tosk. Hinvegin er tað væl kent millum teir, sum fiska við partrolarum, at so nógvur smáupsi kann vera á ymiskum leiðum, at Fiskiveiðieftirlitið noyðist at steingja fyri veiði.

Ein vanligan søludag á Fiskamarknaði Føroya er meginparturin av tí, sum selt verður, toskur 3, 4 og 5.

Toskur 3 er ikki smáfiskur, men toskur, sum er 2 kilo og størri. Hetta er rímiliga góð fiskastødd, men ynskiligt hevði verið, at tann stóra nøgdin av toski, sum kemur upp á land, var enn størri.

Tá nøgdirnar av toski 4 eru eins stórar og nøgdirnar av toski 3, er nærliggjandi at hugsa sær, at ein stórur partur av toski 3 liggur í niðara enda í vekt. Tað merkir, at helst vigar ein stórur partur av hesum fiski 2-3 kilo, samstundis sum stóru nøgdirnar av toski 4 viga minni enn 2 kilo hvør fiskur.

At so eisini nøgdirnar av toski 5 eru størri enn gott er, sigur okkum, at toskurin, sum veiddur verður, í síni heild ikki er stórur fiskur.

## Royndir við húki

Eilif Gaard, stjóri á Havstovuni, ásannar, at tað er ikki lætt at verja ungfiskin, sum nú í stórum tali er á landgrunninum.

– Fiskiveiðieftirlitið hevur stongt økir, tí ov nógvur smáur toskur hevur verið á leiðunum, og hetta er einasti møguleiki, ið eftirlitið hevur.

Stjórin sigur, at Havstovan nú arbeiðir við eini nýggjari roynd, sum hevur til endamáls at royna størri og ymiskar húkar, eins og ætlanin er at royna ymiskt agn.

**»» .... tað eru onkrir grunnar, sum vit kunnu søkja, og hesir grunnar verða nú royndir ...**

EILIF GAARD